VB-GÍ 1-2 (1-1)

# GÍ á øðrum plássi



Málið hjá Palli Augustinussen var ikki nóg mikið til at basa gøtumonnum á Eiðinum

**Gøtumenn kunnu nú við góðari samvitsku fara í summarfríð, teir hava nevnliga vunnið tríggjar teir seinastu dystirnar**

1.DEILD

*Páll Holm Johannesen*

Við sigrinum á VB sunnudagin, hava gøtumenn nú vunnið seg fram á eitt annað pláss í bestu føroysku deildini. Dysturin endaði við 2-1 til GÍ, eftir hálvleikstøðuna 1-1. Tað hevði gingið væl hjá báðum liðum í undanfarnum dystum, og tað sást eisini aftur á spælinum sunnudagin. Leikferðin var høg, og bæði liðini sýndu gott spæl.

## Javnur fyrri hálvleikur

Í fyrra hálvleiki leikaði javnt á, og við møguleikum á bæði mál. Longu í fyrsta minutti hevði Mortan úr Hørg ein risa møguleika. Eftir eina sending frá miðvøllinum, gert Mortan leysur við málverjanm, men ístaðin fyri at leggja bóltin uppá tvørs til ein betri staddan vágbing, royndi Mortan sjálvur, og skotið fór framvið málinum. Fyrstu løtuna í fyrra hálvleiki, hevði VB leikliga yvirvág, men spældi seg ikki fram til stórvegis málmøguleikar. Sum hálvleikurin gekk, fingu gøtumenn meira og meira spæl og dysturin gjørdist javnari.

Eftir hálvur tímið var farin av fyrra hálvleiki, eyðnaðist tað gøtumonnum at skjóta fyrsta málið í dystinum. Eftir GÍ-hornaspark, verður bólturin sendur út úr aftur VB-brotsteiginum, og har er Suni Olsen vælstaddur, og kundi einum hørðum skotum leggja GÍ á odda 1-0. Fimm minuttir seinni hevði Suni Olsen gyltan møguleika økja um GÍ-leiðsluna. Dómarin, Petur Skarðenni, metti, at VB-leikari hevði havt hond á bóltinum, og peikaði tí brotssparksplettin. Suni Olsen varð settur at skjóta, men Bjarni Johansen í VB-málini bjargaði veika skotinum frá Suna.

Stutt fyri hálvleik, svaraði VB aftur. GÍ-leikari heldur í troyggjuni hjá Palla Augustinussen, og dómarin var eirindaleysur, og dømdi brotsspark til VB. Palli Augustinussen varð sjálvur settur at skjóta, og hann sveik ikki álitið. Hálvleiksstøðan var eisini 1-1, og eftir býtið av spælinum, var hetta á góðari leið.

## Gøtumenn vandamiklari

Seinni hálvleikur var leikliga lakari enn fyrri. Vágbingar høvdu bóltin nógv, men stóru málmøguleikarnir trutu. Haraftur ímóti var GÍ nakað vandamiklari, tá teir lopu á. Gøtumenn spældi seg fram til til nakrar møguleikar í seinna hálvleiki, men Bjarni Johansen í VB-málinum tók tað mesta.

Einu ferðina var innskifti, Birgir Jørgensen, rættiliga nær við at leggja VB á odda, tá hann, eftir innlegg, setti høvdið á, men Hallur Hansen í GÍ-málinum bjargaði meistaraliga.

Tað kom tó eitt mál í seinna hálvleiki, og tað fall gøtumonnum í lut. Seinna málið kom eisini eftir eitt hornaspark. Bólturin verður sparkaður væl innfyri, og eftir trunkaspæl, fær Suni Fríði Johannesen prika bóltin í netið.

Hetta mundi kennast eitt sindur snópisligt hjá heimaliðnim, ið helst hevði uppiborið betri lagnu. Ein javnleikur hevði helst verið tað rættvísari úrslitið, men gøtumenn vóru glaðir við, og kunnu nú síggja fram til eina spennandi seinnu hálvu. Nú kappingin er hálvrunnin eru gøtumenn fýra stig aftanfyri oddaliðið HB, og skulu teir fanga oddaliðið, er neyðugt støðuðari úrslitum í seinnu hálvu. Gøtumenn eru rættiliga bjartskygdir undan seinnu hálvu, ti teir vísa á, at teir hava spælt flestu torføru útidystirnar, og skulu teir møta HB, B68, NSÍ og B36 í Sarpigeri, og har plagar at liggja ræðið fyri hjá gøtumonnum.

**VB-GÍ 1-2 (1-1)**

0-1 Suni Olsen
1-1 Palli Augustinussen (br)
1-2 Suni Fríði Johannesen



# -Ætla sær á danska landsliðið

**Stórur kappróður hevur verið á Sorø um vikuskiftið, og føroyingar vundu úr hinum luttakarunum**

KAPPRÓÐUR Í DANMARK

*Páll Holm Johannesen*



*Kappróðrarfólkið í Danmark dýkjur á, og nú er ætlanin at vinna sær sess á danska landsliðnum. Innsett: Katrin Rubek Nielsen t.v. og Katrin Olsen t.h. vunnu um vikuskiftið kapping í Sorø.*

Nú kappróðrarárið her heima er við at halla, dýkjur føroyska kappróðrafólkið í Danmark á. Tríggjar føroyskar kvinnur í høvuðstaðarumráðnum hava um vikuskiftið roynt seg í stórari kapping á Sorø. Talan er um tær tríggjar, Katrin Olsen, Katrin Rubek Nielsen og Sigrid Svartá , ið allar eru niðri í lestrarørindum, og rógva samstundis kapp í frítíðini. Umframt tær tríggjar, sum luttóku á Sorø, ger Beinta Hansen eisini nógv við kappróðurin í Danmark. Allar fýra hava róð kapp í fleiri ár her heima, báðar Katrinar og Beinta Hansen hava róð við Jarnbardi úr Havn, meðan Sigrid hevur verið á Hvessingi úr Sundalagnum

## Føroyingarnir tvey fyrsta pláss

Kappróðurin í Danmark er heilt annaðleiðis skipaður enn her heima. Í Danmark hevur tú tað, ið kallast single- og double scullarar, sum kann yvirførast til ávikavist eitt- og tvey mannafør. Umframt eitt- og tvey mannaførini, eru fýramannafør,......

Róðursfólkið er eisini býtt upp í vektflokkar, har róðursfólkið verður bólkaantin sum lættvektara ella tungvektarar.

Fram til kappingina høvdu Katrin Olsen og Katrin Rubek Nielsen vant í einum tvey-mannafari, meðan Sigrid Svartá hevði vant í eitt-mannafari. Kappast varð bæði leygardag og sunnudag , og ikki kann sigast annað, enn at føroyingarnir stóðu seg frágera væl. Katrin Olsen og Katrin Rubek Nielsen róðu báðar dagarnar, og vunnu tær sannførandi. Báðar róðrarnar vórðu tað heili sjey sekund niður til næstu luttakarnar. Sigrid róð bara sunnudagin, og henni eydnaðist eisini at vinna sín róður. Sigrid stóð onki aftanfyri hinar føroyingarnar, og hon vann eisini sannførandi, har munurin var níggju sekund til næsta bátin.

Føroyingarnar vóru sjálvsagt ovurfegnir eftir róðrarnar, og at nógva venjingin hevði borið ávøkstur. Tær siga úr Danmark, at tað alla tíðina hevur gingið framá, og tað at vinna kappingina í Sorø, hevur bara givið teimum betri mót uppá at gera enn meir við kappróðurin. Næsta kappingin verður í Keypmannahavn um ólavsøkuleitið, og tá fara føroyingarnir eisini at luttaka. Danska landsliðið verður við ta kappingina, og tað hevði verið sera spennandi hjá føroysku róðurskvinnunum at sloppið at roynt seg ímóti teimum. Vanligt er, at manningin á danska landsliðnum verður skift út av og á, og sjálvar meta føroyingarnir seg hava góðan møguleika at koma á landsliðið í framtíðini. - Eftir sigrarnar í Sorø, mugu vit vera ímillum tær fyrstu, sum fáa møguleikan at royna okkum á landsliðinum, siga føroyingarnir úr Danmark.

## Venja nógv

Føroysku róðrarkvinnurnar venja einar átta ferðir um vikuna, og nú summarfrítíð er, hevur verið vant 12-14 ferðir. Venjingin fevnir bæði um fysiska og tekniska venjing. Serliga verður dentur lagdur á tað tekniska, og her hava føroyingar leitað sær hjálp frá Vagn Nielsen, ið er høgt í metum millum róðrarfólki í Danmark. Allar fýra róðurskvinnurnar hava róð nógv í Føroyum, men í Danmark er talan um heilt annað slag av kappróðri, og tí er nógv av venjingartíðini farið til ta teknisku venjingina. Vant verður bæði innan- og uttandura, og vánaliga summarveðrið hevur havt við sær, at føroyingarnir hava verið noyddir at vant nógv inni í seinastuni. Umframt nógvu venjingina, er neyðugt at eta sunt, og býarlívið síggja føroysku róðurskvinnurnar ikki nógv til.

## Broyta samansetingina

Eftir kappingina í Sorø fara nakrar broytingar at fara í samansetingini. Katrin Olsen og Sigrid Svartá fara í framtíðini at rógva saman í tveymannaførðum í lættvekt, meðan Katrin Rubek Nielsen skal royna seg seg í eitt-mannaførðum í tungvekt. Umframt hesar broytingarnar, er ætlanin at manna eitt fýra-mannafarð til kappingina í Keypmannahavn á ólavsøku, men enn er ikkik greitt, um hetta verður til nakað. Væntast kann, at hetta fýramannafarð skal royna seg ímóti danska landsliðinum, og tí hevði tað verið spennandi, um hetta gjørdist veruleikið.

Bussferðir





til Noregs
12.08. - 21.08.
Vitjað verður
m.a. í Gudvangen,
Lærdal, Lillehammer, í Gudbrandsdalinum, í Lom,
Geirenger, við Sognefjørðin, Balestrand og Bergen

Íroknað prísin er:
Ferðin fram og aftur við Norrönu í 4-koyggjukamari við handvaski,
7 nætur á hotellum í dupultkamari v. WC/bað, íroknað ½ vistarhald.
Hartil føroyskur bussur og ferðaleiðari.

úr 5.795,-



SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
e-mail: booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo
team85